# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin



## Harry Motor deyður

Kendi danski bilasølumaðurin, rallykoyrarin, fyrilestrahaldarin og rithøvundurin Harry Motor andaðist hósdagin 13. mai á sjúkrahúsinum í Gentofte, 89 ára gamal, eftir stutta sjúkralegu.

Harry Motor ella Harry Jensen, sum var hansara upprunaliga navn, gjørdist kendur tá hann fyrst í 60-unum varð settur sum sølustjóri hjá Volvo í Danmark. Hann fekk skjótt Volvo til mest selda bilmerki í Danmark. Hetta førdi við sær, at hann varð sendur til Australia at selja Volvo bilar. Har hendi akkurát tað sama.

Harry hevði í mong ár tekniska brævkassan í Motor, limablaðnum hjá FDM. Nógv fólk skrivaðu inn til hann, og harav kom navnið Harry Motor. Hann var eisini kendur frá donskum sjónvarpi og radio.

Eftir at Harry gavst hjá Volvo fyrst í 80-unum, fór hann at halda fyrilestrar um sølu og leiðslu. Hann var eisini í Føroyum og helt fyrilestrar á Hotel Føroyum fyri leiðarum og fólki í handilsvinnuni.

Hann var virkin til tað seinasta og helt yvir túsund fyrilestrar. Eisini gav hann út 21 bøkur.




*Harry Motor gav út tilsamans 21 bøkur. Seinasta bókin er »Succes og brændte broer«, sum júst nú er útkomin*



*Harry Motor (1921-2010). Myndin er tikin í íbúð hansara í Skodsborg, tá danski motorjournalistuin Kurt Ellegaard gjørdi samrøðu við hann í mars mánað í ár*

## Listaframsýning á Eiði

Í samband við at nýggja atelierið hjá Sigrun Gunnarsdóttir á Eiði verður alment tikið í nýtslu, letur upp málningaframsýning 1. hvítusunnudag 23. mai kl. 15.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, setir framsýningina, og tónleikabólkurin »Lady Fire« framførir akkustiskt.

Framsýningin er opin til 13. juni, gerandisdagar millum kl. 17 og 19, og sunnudagar og halgidagar millum kl. 16 og 20. Leygardagin 29. mai er stongt.

Nýggja atelierið er gjørt soleiðis, at atkomandi er fyri øll – eisini fólk í koyristóli.





### 30 ára føðingardagur

Hósdagin 20. mai, fyllir Elvin Weihe, Runavík, 30 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 22. mai kl. 18, á Sjókaféini í Runavík. Øll eru hjartaliga væl komin.

### 60 ára føðingardagur

Leygardagin 22. mai verður Lisabett Egilstrøð Hansen 60 ár. Brunch verður á Verkstaðnum Vón, Hóvabrekka 1, á Argjum frá kl. 12.

### 60 ára føðingardagur

29. mai fyllir Magnus Hansen, Norðskála, 60 ár. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 15. mai frá kl. 19.

### 60 ára føðingardagur

4. august verður Heiðveig Tindskarð 60 ár. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum 17. juli kl. 18. Tey ið vilja gleða Heiðveig við at koma í føðingardagin, verða vinarliga biðin um, at siga frá áðrenn 20. juni. Tlf.: 317326/264030 (Heiðveig), 277556 (Barbara), 227796 (Yvonna).

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 22. juni hava Bodil og Eliesar Finnsson, Hólavegur 23, Þorkeri, silvurbrúdleyp. Veitsan verður fríggjakvøldið 25. juni kl. 19 á Hotel Øravík, tey ið vilja gleða okkum at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 373860 ella 227496.

---

†

## ANDLÁT

Kunngjørt verður, at kæri maður,
pápi, abbi, verfaðir okkara

**Jákup Mohr Saltangará**
Ættaður úr Fuglafirði

Andaðist á Landssjúkrahúsinum 16. mai 63 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 18

Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju fríggjadagin kl. 14.

***Vegna tey avvarðandi***
***Jónhild og børnini við familju***

---

†

## ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Jákup Stefansson,**
Tórshavn,

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánakvøldið 86 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 16.00.

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju fríggjadagin kl. 13.00.

***Familjunnar vegna***
***Jacobina***

---

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið elskaða kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Frida Thomsen**
Þorkeri

fór heim til Harran.

Takk til Suðuroyar Sjúkrahús, G4, onkologisku deild, palliativa toymið

og heimatænastuna, ið hjálptu og vístu umsorgan.

Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðina og til ervið.

Takk fyri kransar, blómur og heilsanir og tykkum, ið sendu peningagávu til Krabbameinsfelagið

Eisini ein tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu Fridu til hennara seinasta hvíldarstað á fold.

***Vegna familjuna***
***Andrew***
***Johan, Meta, Anna og Jónhild***

Eg vil eisini veita eina hjartans tøkk til tykkum, ið mintust konu mína og meg á diamantbrúdleypsdegnum 28. januar 2010.

**Andrew Thomsen**